# 2004

# ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR




# ÍF – VB

**LANDSKAPPING**

**Sunnudagin 29. august 2004 Kl. 15.00 í Fuglafirði**

HAVSBRÚN

TOYOTA MIKLAGARÐUR P/F Petur Larsen

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel 444636 / 228771
Fax 444634
www.if.fo
if@if.fo

**Leikskrá 7 2004**

**Útgevari:**
**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**ÍF-stuðlar**

**Ábyrgd**
ÍF-stuðlar

**Blaðnevnd**
ÍF-stuðlar

**Myndir**
Álvur Haraldsen/
Sosialurin

**Kápumynd**
Magni á Lakjuni stríðist um bóltin við Egil á Bø úr B36 í dystinum í Gundadali
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Prent**
Estra

**Uppseting**
Sisero 351800

## TAÐ HALDA VIT

Nú savnast vit so aftur til dyst í Fuglafirði. Hesaferð er tað VB, sum kemur á vitjan. Seinast vit leiktu her í Fuglafirði sá einki serligt út. Ta ferðina vunnu skálamenn heili 4-1, og hetta er nakað, sum vit øll gjarna vilja síggja broytt. Síðsta vikuskifti leiktu okkara menn í Havn móti oddaliðnum HB, og ikki kann sigast annað enn at vit leiktu ein fínan dyst, sum vit við eitt sindur størri hepni kundu vunnið. Frammannfyri 2-1 móti føroyameistarunum og oddaliðnum líka áðrenn hálvleik, tað sá ikki so heilt galið út. Men gleðin kann til tíðir vera stokkut. Líka áðrenn hálvleik javnaði HB, og sjálvt um vit í stórum pørtum av seinna hálvleiki høvdu leikliga yvirvág, so endaði tað heila við, at HB dróg longra stráið og vann 4-2.

Men um vit sammeta við dystin móti Skála, so var tað eitt hamskift ÍF-lið, sum kom út til dystin móti HB. Móti Skála fungeraði einki. Avleveringar vóru skeivar, temjingar ov óneyvar, takklingar ov seinar osv. Men móti HB sýndist alt til tíðir at virka. Menn vóru tendraðir og kanska til tíðir yvirtendraðir, spælið frameftir vøllinum var sera gott, menn kempaðu um hvønn bólt og fram um alt, so sá tað veruliga út til, at

*Framhald á bls. 8*





DYSTURIN Í DAG

# Góðu taktirnar skulu varðveitast




ÍF fær í dag vitjan av vágbingum, sum liggja væl fyri á stigatalvini. Teir hava onkur av seinastu árunum verið við til at mynda oddin í føroysku 1. deild, og so seint sum í 2000 vunnu teir higartil einasta meistaraheitið í søgu felagsins.

VB hevur, sum fyrr sagt, havt eitt fínt kappingarár, og fyrra dystin, sum bleiv spældur í Vági millum hesi bæði feløgini vann VB 3-1. Ta ferðina kom VB rættiliga tíðliga á odda, men við einum korteri eftir megnaði Bartal Eliasen at javna. Men ÍF kláraði ikki at halda tørn ímóti vælleikandi VB-liðnum, og síðstu 10 minuttirnar fóru 2 mál ígjørnum afturat, og sostatt 3-1 til VB.

Sum flest øllum kunnugt, so liggur kanska størsta styrkin hjá vágbingum í heimavøllinum á Eiðinum í Vagí, har eitt og hvørt lið altíð hevur stórar trupulleikar at fáa stig við heimaftur. Hinvegin hevur ikki altíð gingist so heilt væl hjá VB at fáa stig á útivølli, og vónandi verður tað eisini soleiðis í dag.

Styrkin hjá VB-liðnum annars liggur í eini kropsligt sterkari defensiv, samstundis sum teir eru eitt sera gott kontra lið. Og so má spælfordeilarin hjá VB, Milan Kuljic, eisini metast at vera ein stór styrki hjá liðnum. Tí sum oftast er hann arkitekturin aftanfyri farligu kontraálopini og álopini sum heild hjá VB.

Eingin ivi er um, at VB í dag ætlar at kanna sær øll 3 stigini við suðuraftur. Fyri at teir skulu hava nakran møguleika fyri at røkka upp til B36 og Skála, so er eitt krav fyri teir, at teir vinna hvønn dyst, og tískil eisini dystin í dag. Men tað skal heldur eingin ivi vera um, at ÍF eisini ætlar sær øll 3 stigini. Eftir dystin í síðstu viku móti oddaliðnum HB í Havn, har ÍF til tíðir leikti sera góðan fótbólt, eru bæði spælarar og viðhaldsfólk farin at trúgva uppá, at ÍF uttan iva kann taka stig frá einum og hvørjum liði í landinum, og kanska enntá vinna eitt og hvørt lið. Vit vóna í øllum førðum at ÍF vinnur í dag.

Góðan dyst.

















# Fuglafjørður

býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak

býurin, har náttura og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala

**Stutt sagt:**

býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar Kommuna**
P.O. Boks 30 · tel. 444006 · fax 444657
fko@fuglakomm.fo
www.fuglakomm.fo

# TIPS 13

## VEDDA OG VINN VIÐ BIRGARI OG JANUSI

Aftur í ár skipa teir báðir Birgar og Janus – sum nú búgva í ávíkavist Keypmannahavn og Aberdeen – fyri kappingini "vedda og vinn við Birgari og Janusi". Besti tipparin í einstøku kappingunum vinnur ein kassa av sodavatni frá Føroya Bjór. Umframt vikuvinningin sleppa allir 9 vinnararnir út at bowla saman við 1. liðsleikarunum eftir kappingina. Vinnararnir eru eisini við í lutakastinum um ein APEX-flogferðaseðil frá Atlantic Airways.

Fyri at luttaka og vinna, skalt tú seta kross í tann rútin (1, X ella 2), ið tú heldur eru rættir. Skriva navn, bústað og tlf.nr. og lat hann inn í ovaru hædd í Ítrottarhúsinum undir ella beint eftir dystin. Tann ella tey, sum hava svara flest spurningum rætt, eru við í lutakastinum um sodavatns-kassan. Góða eydnu!

*Røttu svarini til spurningarnar hesaferð fært tú at vita í næstu leikskrá.*

*TIPS 13-seðilin skal latast inn í ovaru hædd í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst.*

| 7. UMFAR (set x í rætta rútin) | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|
| 1. Hvussu eitur danski venjarin hjá KÍ? 1. Ove Flindt Bjerg X. Bjørn Krogh 2. Frank Skytte | | | |
| 2. Hvør gjørdist toppskjútti í EM2004? 1. Ruud Van Nistelrooij X. Milan Baros 2. Angelos Charisteas | | | |
| 3. Hvør skeyt fyrsta málið í Premier League 2004/05? 1. Jermaine Defoe X. Djibril Cissé 2. José A. Reyes | | | |
| 4. Hvør er elsti spælari í Premier League 2004/05? 1. Nigel Martyn X. Les Ferdinand 2. Colin Cooper | | | |
| 5. Hvørjir vóru málskjúttar hjá ÍF ímóti HB í Gundadali í síðstu viku? 1. Magni og Sylla X. Gunnar og Høgni Z. 2. Høgni Z. og Magni | | | |
| 6. Hvar var HM endaspælið í 1982? 1. Spania X. Italia 2. Vestur-Týsklandi | | | |
| 7. Hvussu eitur klaksvíkingurin, ið hevur skrivað sáttmála við íslendska meistaraliðið KR? 1. Rógvi Jacobsen X. Atli Danielsen 2. Heðin á Lakjuni | | | |
| 8. Hvar liggur Stadio Delle Alpi? 1. Milano X. Rom 2. Torino | | | |
| 9. Hvussu gamal er Trúgvi? 1. 23 X. 24 2. 28 | | | |
| 10. Hvussu eitur málverjin hjá FC Midtjylland? 1. Casper Ankergren X. Morten Cramer 2. Peter Skov-Jensen | | | |
| 11. Hvør var fyrsti Champions League vinnari (92/93)? 1. Reyða Stjørna Belgrad X. Olympique Marseille 2. AC Milan | | | |
| 12. Útskifting! Fritleif fær eitt gult kort og fær síðani boð um at blíva úskiftur. Dómarin steðgar dystinum og biður ÍF fremja sína útskifting, men Fritleif vil ikki út og noktar at fara av vøllinum ... Hvat ger dómarin? 1. Einki X. Gevur Fritleif tað seinna gula kortið og rekur hann av vøllinum 2. Gevur Fritleif eina ávaring og biður hann fremja útskiftingina | | | |
| 13. Hvørji lið spældu seg í OL-finaluna í fótbólti? 1. Frakland og Brasilia X. Paraguay og Argentina 2. Irak og Italia | | | |

Føroya Bjór    ATLANTIC AIRWAYS

Navn:    Bústaður:    Telefon:

Klipp ella skrøð



# Maktdemonstratión ella yvirraskilsi ... ?

Nú er nýggja kappingarárið í Premier League so skotið í gongd, og ein byrjar kanska at hóma, hvussu kappingin í ár fer at laga seg. Tvey umfør eru í skrivandi løtu spæld í Premier League, og favorittarnir hava lagt hart út. Bæði Arsenal og Chelsea hava vunnið báðar sínar fyrstu dystir, meðan Man Utd hevur vunnið 1 og tapt 1, nevniliga móti Chelsea. Liverpool hevur eisini fingið eina góða byrjan uppá kappingarárið undir nýggja venjaranum Rafael Benitez. Teir hava eftir 2 umfør 4 stig. Men sum flest øll roknaðu við, so verður tað nettupp millum hesi 4 liðini, at meistaraheitið skal avgerðast, men vit fara at hyggja nærri eftir, hvørji lið møguliga kunnu koma at blanda seg ímillum hesi fýra liðini.

Newcastle er eitt lið, sum hevur verið í framgongd síðstu árini, og teir mugu uttan iva metast at vera eitt av liðunum, sum kemur at blanda seg í stríðið um UEFA-cup pláss ella kanska enntá Champions League pláss, men teir hava fingið eina ringa byrjan uppá kappingarárið við bert 1 stigi.

Middlesbrough, sum hava keypt fleiri spælarar upp til nýggja kappingarárið, hava heldur ikki fingið eina alt ov góða byrjan. Eisini bara 1 stig, men teir hava hóast alt møtt Arsenal og Newcastle, so tað er ilt at meta um teirra støðu enn.

Tottenham er eitt lið, sum kann ganga eini ljósari framtíð í møti. Teir hava undir leiðslu av Jacques Santini og Frank Arnesen fingið eina strálandi byrjan uppá kappingarárið, við einum javnleiki móti Liverpool og einum sigri á St. James' Park móti Newcastle, so teir kunnu saktans blíva tað heilt stóra yvirraskilsið í ár.

Tvey onnur lið, sum fólk vænta okkurt av í ár, eru bæði Birmingham-liðini, Birmingham og Aston Villa. Aston Villa hevur 4 stig, og har kann leggjast afturat, at teir spældu sannan meistarafótbólt, tá teir í 1. umfari niðurspældu Southampton, hóast úrslitið bert gjørdist 2-0.

Tað hevur hinvegin gingið eitt sindur striltið hjá Brimingham, sum bert hevur 1 stig, men hetta kann skjótt broytast.

Sum sagt, so er myndin




við at gerast tann sama sum undanfarnu árini. Arsenal, Chelsea, Man Utd á sigurskós. Liverpool hevur fingið góða byrjan, og kann fáa eitt gott kappingarár, meðan hini liðini, sum eru væntað at enda í toppinum, hava fingið eina eitt sindur verri byrjan, líka við Tottenham sum einum undantaki.

Kanska hetta verður árið, har eitt yvirraskilsi skal finnast í Premier League, ella kanska hetta verður enn ein maktdemonstratión av toppliðunum. Alt kann henda!

Men eitt er tó sikkurt, vit bíða øll spent til endaspurtin!

*Framhald frá bls. 2*

spælarar og áskoðarar trúðu uppá, at tað kundi lata seg gera at vinna á føroyameistarunum í Havn. Tað er júst hetta vit vilja síggja aftur í dag. Viljan skína úr øllum, bæði spælarum og áskoðarum.

Sigast má, at frá síðulinjuni í Havn var mangan stuttligt at hoyra, hvussu væl ÍF-áskoðararnir hoyrdust. Í mun til HB-áskoðararnar vóru vit ikki nógv í tali, men til tíðir var tað bert fuglfirðingar, ið man hoyrdi í Gundadali, og hví ikki lata tað vera líka í dag? Lat okkum øll fara út í dag, og standa saman um fremsta fótbóltsliðið hjá Fuglafirði, so er eingin ivi um, at stigini nokk skulu koma. Tí tá vit øll standa saman, bæði áskoðarar, leiðarar, hjálparfólk og viðhaldsfólk, so skulu úrslitini heilt sikkurt eisini koma.

Við hesum vil eg ynskja øllum vælkomnum til dyst í Fuglafirði í dag. Góðan dyst, og koyr á ÍF!!


**Rasmus Joensen**

**Málarameistari**

**530 Fuglafjørður**

**Tel. 444 139 - 214139**



**Keyp ein tennisbólt**

og tú kanst vinna ein Apex-flogferðaseðil

Kostnaður 30,-

Í hálvleikinum skulu bóltarnir tveitast út á vøllin.

Tann bólturin, sum liggur næst miðblettinum, vinnur Apex-flogferðaseðilin.

ATLANTIC AIRWAYS








Persónsvognur úr kr. **313.291,-** v. mvg

Vøruvognur úr kr. **247.571,-** v. mvg

Skaðaumvæling av øllum bilsløgum

á Hjalla FO-180 Hoyvík Tel 311013 www.kollsker.com

**Bilverkstaðið**

v/ Hans J. Kollsker

**Alfa Seafood Spf**

Box 10 • FO-530 Fuglafjørður • Tlf. +298 44 49 51

Fax +298 44 48 48 • Fartlf. +298 22 54 75

E-mail: alfa@post.olivant.fo







FONN FLOG

FO-700 Klaksvík · Tel. 456363 · Fax 457373 · fonnflog@fonnflog.fo

GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/f

480 Skála tel. 44 16 66 fax 44 18 71

Heiðursmerkir

Landsins størsta og besta úrval



*Alt innan ítróttarheiðursmerkir, steyp, heiðursmerkir, stokar, plattar...*

EILIF ARGE

Klaksvíksvegur · 700 Klaksvík

Tel. 455164 · Fax 457576 · arge-kl@post.olivant.fo

Piddasahandil og Ribarhús

listaframsýningar

heimavirkaðir prýðis- og brúkslutir

føroyskt - »bundið og tøvt« í meturmál

føroyskar fløgur

loppumarknaður

- og altíð ein kaffimuður við »heimabakaðum«

opið er: mán. - frí. 15.00 - 17.30
ley. 11.00 - 13.00

annars eftir avtalu á tlf. 44 44 27



hugnaligt og kvelkjandi umhvørvið mitt í býnum í Fuglafirði




s.pf JAN MOHR

Timbur- snikkara- og betongarbeiði

Tlf. 44 49 49 Fartlf. 21 99 49-21 89 49



BARNAÚTGERÐ
Ciconia

tel 45 65 30
fax 45 65 31

Klaksvíksvegur 63 · boks 163 · Klaksvík






PEUGEOT

Meinhardt Arge




Tilfar til umvælingar,
ábøtur ella annað ...
... spyr fyrst hjá okkum!

Fuglafjarðar Timburhandil
tel. 444 126

FAROE

FISKAVIRKIÐ Í FUGLAFIRÐI



Rustviðgerð ella forrútar
vit hava loysnina
BE AUTOGLAS
Í Brekkum 1
530 Fuglafjørður
tel. 444 215
fax 444 813
fartel. 220 876

BREYÐMOLIN
530 Fuglafjørður • Telefon 444388

WWW.FAROEDIVE.FO
TLF. 218929 / 224224




fk
Fuglafjarðar Keypssamtøka
Tel 444095 - 444495
Fax 444895 Far 217095

FARPACK
Staravegur 5 • P.O.Box 3099 • FO-110 Tórshavn
Telefon 353000 • Fax 53010
www.farpack.com • e-mail: farpack@farpack.com



Alt snikkaraarbeiði verður gjørt.
Øll sløg av vindeygum, hurðum, trappum umframt ymiskar seruppgavur.
Tel 31 71 66 • Fartel 21 71 56
Fax 31 81 31 • Hvalsoyargøta 11
Træsmiðjan GLT



## Fjølbroyttur veitari til vinnuna

KJ er ein fjølbroytt fyritøka, sum veitir útgerð, eykalutir og tænastur til fiskivinnuna, alivinnuna, flutningsvinnuna og entreprenørvinnuna. Í okkara úrvali av útgerð finst m.a. trolspøl, kranaspøl, marinekranar, lastbilakranar og gravimaskinur. Í okkara stóru eykalutagoymslu hava vit hydraulikkfittings, slangur, rør, pumpur, motorar, ventilar, koblingar, tetningsringar o.m.a.



- Spøl
- Kranar
- Hydraulikklutir
- Filtur
- Aliútgerð
- Katamaranar



KJ HYDRAULIK

P.O. Box 110 á Kambsdalur · Tel +298 444 170 · Fax +298 444 265 · info@kj-hydraulik.com · www.kj-hydraulik.com




Reiðari innan frakt- & sandbátar
Krana- og lastvognskoyring
Sandsøla

SANDGREVSTUR

Stovnað 1949

530 Fuglafjørður
tel. 444 121
fax 444 921



Tannlæknastovan

Steintór Larsen tannlækni

Brynhild Maria Lamhauge tannrøktari

Viðtala:
8.00-12.00 og 13.00-16.00

Torkilskrókur 8 530 Fuglafjørður tel. 444 358

Vit hava stórt úrval av gløsum, serviettum, dúkum, ljósum og einnýtisborðbúnaði.
Ert tú í iva um mongd, lit ella støðd, ráðgeva vit tær fegin. Vit taka óásettar pakkar aftur.

*Brúðleyp Dóp Veitslu Merkisdag Meistaraheit*



th-dam@post.olivant.fo

Thomas Dam á Hálsi
HÚSGØGN · LEIKUR · NÁTTÚRUDEILD · HEILSØLA
HEYKAVEGUR 3 · TLF. 31 14 00

**Timburmeistari**

Ingi W. á Tórgarði Tlf. 22 61 12
Bøvegur 12, 530 Fuglafjørður

- Alt Timbur-, snikkara- og stoypiarbeiði
- Sethúsabygging
- Virkisbygningar
- Umvælingar

**Dygd = Trygd**

# SAMKEYP

*-tí tað lønar seg*

**NORÐAGØTA**
telefon. . . . . . . . . 44 11 19
skrivstovan . . . . . 44 18 77
fax. . . . . . . . . . . . 44 21 60
fartelefon. . . . . . . 21 03 46

Opið er
manadag - sunnudag kl. 9.00-23.00
p-w@post.olivant.fo

PW




# Skoda Fabia

Frá 132.750

Nógv fyri pengarnar • 10 ára rustgaranti

HONDA NORÐBIL SKODA HYUNDAI

Box 1070 • Oyggjarvegur • Tórshavn • Tel 31 37 07 • Fax 31 08 55



# Góðskan á arbeiðnum altavgerandi

Nýbygging
Umvæling
Ráðgeving
Tekningar
Kostnaðarmetingar



# JLJ-Bygging

Verkfrøði og húsasmíð

690 Oyndarfjørður
Tel 21 47 87 & 44 47 87
t-postur: jljuul@post.olivant.fo










Timbur-, betong-
og jørðarbeiði

H.K.J. byggivirkið
Postmoga 40
530 Fuglafjørður
Tel. 21 86 96 og 22 77 99
Fax 44 46 56










OROBLU
Seamless Collection
Alt innan húðrøkt frá
LANCÔME
BIOTHERM
Undirklæði frá
LOVABLE
FILA
Ninni
Parfumeri • Lingeri
Fuglafjørður • tel 444344


PrimaVera
ja, tað má tað vera!
Pizzaria
PrimaVera
á Kambsdali tlf. 444446


Umvæling og søla av:
BAADER - maskinum
FOMACO - salt sprøjtum
og ymiskum úr rustfríum
stáli.
Eisini selja vit: legur,
POM, bronsu, messing,
boltar og møtrikkar v.m.
P/F Petur Larsen
Bakkavegur - FO-530 Fuglafjørður
tlf. 444174 - fax 444285 - t-post: ol@online.fo
DIMMALÆTTING 341200


Álvaskot
Fysioterapiviðgerðarstova
530 Fuglafjørður
Telefon 44 51 44
Álvur Hansen, fysioterapeutur
Turið L. Petersen, fysioterapeutur


Føroya størsta
úrval av
teldum og tilhoyri
Støkkið inn á gólvið
SpF Teldu Tænastan
Staravegur 5 - 110 Tórshavn - Tlf. 317620 - Fax 317699 - info@tt.fo - www.tt.fo


HAVSBRÚN
Tel. 41 44 00 • Fax 41 44 01 • havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

# LEIKARIN HESA FERÐ TEITUR JOENSEN




## TÚ

**Navn:** Teitur Joensen
**Føðingardagur:** 21-10-1983
**Starv:** arbeiði á statoilstøðini í Kollafirði
**Hædd og vekt:** 168 cm. og 63 kg
**Største styrki:** Kanska luftspælið ...
**Størsti veikleiki:** Eitt sindur for dovin
**Torførasti mótstøðumaður:** Viggo
**Frítíðarítriv:** Fótbóltur og hondbóltur
**Vónir fyri 2004:** At vera verandi í deildini, men eitt 3. pláss hevði helduri kki verið av vegnum

## TÍN ÍTRÓTT

**Pláss á vøllinum:** Á vinstra ella høgra veingi ella í álopinum
**Fyrsti dystur á 1. liðið:** Í apríl ella mai 2002 móti Skála á Eiði. Vit vunnu 1-0
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** Guð viti ... Tá eg var heilt ungur
**Aðrar ítróttargreinar:** Hondbóltur og talv (um talv kann teljast sum ítróttur)
**Minningarríkasti dystur:** Tá vit vunnu á HB á Eiði á sundalagsstevnu 2002
**Størstu fótbóltsliga ávirkan:** Magnus á Stongum
**Besti fótbóltsleikari:** Thierry Henry
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Hondbólt
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** spæl við bólti
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** at renna er ikki av tí allar mest skemtingarsama
**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í heiminum:** Gianluigi Buffon, Roberto Carlos, Javier Zanetti, Walter Samuel, Fabio Cannavaro - Pavel Nedved, Patrick Vieira, Zinedine Zidane - Ronaldinho, Thierry Henry, Alan Shearer
**Matur og drekka:** Ræstur fiskur og mjólk
**Besta árið og hví:** 1983, tí tá bleiv eg føddur
**Slag av tónleiki:** Eg lurti eftir tí mesta, bara tað er gott!
**Besta sending í SvF:** Hevur SvF nakra góða sending??
**Besti filmur:** Tað eru so nógvir góðir filmar, men Braveheart og Arlington Road munnu vera tvey góð boð
**At slappa av:** hyggja at einum góðum filmi
**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Michael Laudrup
**Stuttligasi persónur:** Fritleif kanska ...
**Sjónvarp/filmstjørna:** Edward Norton
**Sangari/sangarinna:** Eivør Pálsdóttir og Teitur Lassen
**Besta bók/blað:** Dead Poet's Society



# Lítla sølubúðin í ítróttarhúsinum

Damurnar, sum síðstu árini hava havt sølubúð í ovaru hæddini í ítróttarhúsinum í sambandi við dystir hjá 1. liðnum, eru aftur í ár til dystin fús, sjálvt um umstøðurnar eru avmarkaðar. Hildigarð stendur fyri, men hon fær góða hjálp frá øðrum. Í sølubúðini selja tey sodavatn, kaffi, te, køkur og góðgæti. Sølubúðin hevur opið frá dystarbyrjan til nakað eftir dystin. Tað er eisini í sølubúðini, at tey, sum atkvøða um ársins ÍF'ara og tey sum gita í kappingini ÍF TIPS 13, skulu lata seðlarnar inn.

## ÍF TIPS 13 - vinnarin og svarini frá síðstu kappingini

# Eingin vann seinast

Undirtøkan til tips 13 var sera góð seinast, men spurningarnir vóru sera torførir í mun til, hvat teir onkuntíð hava verið. Úrslitið var eisini hareftir, tí eingin megnaði at fáa tey 9 røtt, sum man skal hava, fyri at nakar skal kunna vinna. Fýra av teimum, sum høvdu gitt, megnaðu at fáa 8 røtt, men tíverri, so er hetta ikki nokk til at kunna ogna sær jolly sodavatnskassan frá Føroya Bjór. Av tí at eingin vann, so verður tað heldur eingin, sum fær ein lepa í endaliga lutakastinum um ferðina frá Atlantic Airways.

| | | |
|---|---|---|
| 1. Hvør er venjari hjá B36? | 1 | Jóannes Jakobsen |
| 2. Hvør vann Løgmannssteypið á ólavssøku? | X | HB |
| 3. Nær gjørdust B68 seinast FM-vinnarar? | X | 1992 |
| 4. Hvør er nýggjur hollendskur landsliðsvenjari? | X | Ronald Koeman |
| 5. Hvør var dómari í EM 2004 finaluni? | 1 | Markus Merk |
| 6. Hvør varð kosin heimsins besti leikari 1992? | 1 | Marco van Basten |
| 7. Hvør var toppskjútti í Premier League 1993/94? | 1 | Andy Cole |
| 8. Hvør leikari fekk flest gul kort í Premier League 2003/04? | 1 | Robbie Savage |
| 9. Hvussu eitur venjari hjá Lyon? | 2 | Paul Le Guen |
| 10. Hvussu ofta hevur Everton vunnið enska meistaraheiti? | X | 9 ferðir |
| 11. Bartal ger aðru ljótu tacklingina og stendur til annað gula kortið, men dómarin letur Skála fáa fyrimun. Skála koma heilt nær ÍF-brotsteiginum, men Viggo vinnur bóltin og sendir bóltin fram til Bartal, sum skorar ... ! Hvat ger dómarin? | 1 | Dømir fríspark til Skála og gevur Bartali annað gula kortið |
| 12. Hvør er lættast (kg.)? | 2 | Trúgvi |
| 13. Diego Armando Maradona hevur spælt 91 landsdystir fyri Argentina, men hvussu nógv mál fekk hann? | 1 | 34 mál |

**Starvsnevnd:**
Formaður
Rúni Petersen, 556661
Varaformaður
Sámal Hansen, 212088
Skrivari
Høgni á Lakjuni, 444418
Peningarøkil
Linda Joensen 222180
Tiltakslimur:
Petur við Gjónna
**Fótbóltsdeild**
Tórstein Joensen, 444706
Eivin Breiðaskarð, tel. 214003
Guneif Berjastein, 745041
Hildigarð Eliasen, 228771
Atli Petersen, 268295
Ólavur Larsen, 224659
Samskipanarleiðari:
Hildigarð Eliasen, 228771
**Venjarar**
**1. deild**
Sigfríður Clementsen, 317659/517659
**3. deild**
Mortan Thomsen, 214404
**4. deild**
Esbern Abrahamsen, 744593
**Old Boys**
Kristian Petersen, 444700
**Unglingar**
Ólavur Larsen, 224659
**Dreingir Ø.**
Ólavur Larsen, 224659
**Smádr. Ø**
Ørvar Jacobsen 268685
**Piltar ½ vøll**
Njál R. Petersen, 444994
**Smápiltar**
Hagbardur Joensen, 212636 og Ørvar Jacobsen, 268685
**Gentur**
Jonn S. Thomsen, 229859 og Ørvar Jacobsen 268685
**Smágentur**
Ørvar Jacobsen, 268685
**Gentur 10-12**
Sarita Jacobsen, 253383 og Nikolina Kristiansen, 744060
**Pinkur a-b**
Hanna Poulsen, 262402

Krana- &
Lastvognskoyring
Tel. 217 245 - 284 245 - 444 245

døgg
.alt innan nýmótans hárviðgerð.

Halla Olsen
tlf. 21 93 79
tlf. 44 55 50
Anja Kleminksdóttir
tlf. 25 83 00



opið er:
mán - frí 10 - 17
hósdag 10 - 19
leygardag 10 - 14

Toftavegur 1 · 530 Fuglafjørður · tlf. 44 55 50

BERGFROST
COLD STORAGE

P.O. Box 85
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
www.bergfrost.com

Tel +298 44 46 11
Fax +298 44 46 07
Mobile +298 22 36 67
bergfrost@bergfrost.com

AP BUSSKOYRING
V/ Andreas Poulsen
✆ 22 52 20 - 44 17 20

Fuglafjaðrar Træsmiðja
við Jóhan Larsen

Snikkaraarbeiði
• Vindeygu
• Úthurðar
• Trappur
• Umvælingar

Tel: 44 42 34
Tel: 21 42 34
Toftagøta 12
530 Fuglafjørður

DIMMALÆTTING 341200

SV - TRANSPORT
530 Fuglafjørður
tel. 44 41 77

Allur flutningur við:
Lastbilum | Kranabilum | Trailarum
Dumparum | Bingjubilum

# ÁRSINS ÍF-ARI 2004

## Seinast var Karstin bestur

Í dystinum móti Skála sunnudagin 15. august valdu áskoðararnir sikkurt Karstin til besta leikaran. Næstir í røðini vóru Silla og Viggo. Fyri at verða besti leikarin fær Høgni ein sunnudagsdøgurða fyri tvey á Restaurant Muntra.



### Støðan

| Leikari | Seinast | Íalt |
|---|---|---|
| Karstin | 65 | 149 |
| Silla | 30 | 30 |
| Viggo | 20 | 72 |
| Hanus | 15 | 61 |
| Sverri | 11 | 11 |
| Magni | 10 | 88 |
| Jan Guttesen | 10 | 59 |

Tann leikarin, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig. Síðan verður talt saman eftir hvønn dyst og úrslitið sæst í leikskránni til komandi dyst. Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst. Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddina í Ítróttarhúsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst.

## VINNINGAR

Ársins ÍF-ari fær 1.000,-
Nr. 2 fær 500,-
Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3

FA EILIF ARGE

Restaurant Munta letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár

Restaurant Muntra

Tá ið kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Haraldsen

HARALDSEN *-títt keyp-*

## ATKVØÐUSEÐIL ÍF-VB, 29. august 2004

Nr 1 (5 stig) ____________________

Nr 2 (3 stig) ____________________

Nr 3 (2 stig) ____________________

Veljari / tel: ____________________

Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hædd í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst



## STØÐAN 1. DEILD MENN - 26. AUGUST

| | Lið | D | V | J | T | V - T | S | Heima | Úti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Skála | 13 | 8 | 2 | 3 | 28 -16 | 26 | 6 - 0 - 1 | 2 - 2 -2 |
| 2 | HB (m) | 13 | 10 | 2 | 1 | 35 -12 | 32 | 6 - 1 - 0 | 3 - 1 -2 |
| 3 | NSÍ | 13 | 5 | 3 | 5 | 20 -18 | 18 | 4 - 1 - 2 | 1 - 2 -3 |
| 4 | VB | 13 | 5 | 4 | 4 | 18 -15 | 19 | 3 - 2 - 2 | 2 - 2 -2 |
| 5 | B36 (s) | 13 | 7 | 3 | 3 | 23 -15 | 24 | 2 - 2 - 2 | 4 - 1 -2 |
| 6 | EB/Str. | 13 | 5 | 2 | 6 | 22 -20 | 17 | 3 - 1 - 2 | 2 - 1 -4 |
| 7 | KÍ | 13 | 3 | 7 | 3 | 18 -18 | 16 | 1 - 4 - 1 | 2 - 3 -2 |
| 8 | GÍ | 13 | 6 | 2 | 5 | 23 -24 | 20 | 2 - 1 - 4 | 4 - 1 -1 |
| 9 | ÍF (u) | 13 | 2 | 1 | 10 | 19 -43 | 7 | 1 - 1 - 4 | 1 - 0 -6 |
| 10 | B68 | 13 | 0 | 2 | 11 | 10 -37 | 2 | 0 - 1 - 5 | 0 - 1 -6 |

## LEIKARAHAGTØL 1. DEILD MENN 2004

| | Leikari | Min | D | Út | Inn | G | R | M | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fróði Poulsen | - | - | - | - | - | - | - | - |
| 2 | Áki Petersen | 940 | 12 | 4 | - | - | - | 1 | 85 |
| 3 | Sverri Ellingsgaard | 70 | 4 | - | 4 | - | - | - | 11 |
| 4 | Viggo Johannesen | 1.170 | 13 | - | - | 2 | - | - | 72 |
| 5 | Roy Róin | 290 | 5 | 5 | - | - | - | - | 4 |
| 6 | Bartal Eliasen | 950 | 11 | - | - | - | 2 | 1 | 18 |
| 7 | Bárður á Lakjuni | 257 | 5 | 1 | 3 | - | - | - | 2 |
| 8 | Fritleif í Lambanum | 1.042 | 12 | 1 | - | 4 | 1 | - | 100 |
| 9 | Atli Petersen | 195 | 3 | 1 | 1 | - | - | - | 5 |
| 10 | Hanus Eliasen | 779 | 11 | 3 | 2 | 1 | - | 1 | 61 |
| 11 | Eyðolv Petersen | 956 | 12 | 3 | 1 | - | - | 1 | 145 |
| 12 | Árni Jóhan Petersen | 737 | 9 | 3 | 1 | - | - | - | 2 |
| 13 | Høgni á Lakjuni | 148 | 3 | 1 | 2 | 2 | - | - | - |
| 14 | Ken Bærentsen | 11 | 1 | - | 1 | - | - | - | - |
| 15 | Eyðun Ryggshamar | 163 | 6 | 1 | 5 | 1 | - | - | 18 |
| 16 | Karstin Joensen | 1.170 | 13 | - | - | - | - | (43) | 149 |
| 17 | Høgni Zachariassen | 945 | 11 | - | 1 | 1 | - | 5 | 130 |
| 18 | Rúni Eyðunsson Eltør | 877 | 10 | 2 | - | 3 | 1 | 3 | 21 |
| 19 | Teitur Joensen | 81 | 6 | - | 6 | - | - | - | 9 |
| 20 | Jonn Sólheim Thomsen | 29 | 1 | - | 1 | - | - | - | - |
| 21 | Tórstein Joensen | 206 | 4 | - | 3 | - | - | - | - |
| 22 | Paul Íburg | 40 | 2 | - | 2 | - | - | - | - |
| 23 | Jan Guttesen | 355 | 4 | 1 | - | 1 | - | - | 59 |
| 24 | Høgni Madsen | 258 | 4 | 1 | 1 | 2 | - | - | 2 |
| 25 | Silla Amed Davy | 151 | 2 | 1 | - | - | - | 1 | 30 |
| 26 | Gunnar Guillermo Nielsen | 90 | 1 | - | - | - | - | 1 | - |
| 28 | Magni á Lakjuni | 896 | 11 | 6 | - | 1 | - | 4 | 88 |

*FRÁGREIÐING: D: Dystir, Min: Minuttir leiktir, Út: Dystir útskiftur, Inn: Dystir innskiftur, G: Gul kort, R: Reyð kort, M: Mál, Stig: í kappingini ársins ÍF-ari*

**Aðrir dystir í 1. deild dag - 14. umfar**

B36 - Skála
KÍ - NSÍ
B68 - HB
EB/Streymur - GÍ

**Dystir í 1. deild sunnudagin 12. september – 15. umfar**

VB – B68
Skála - KÍ
NSÍ - GÍ
ÍF – EB/Streymur
HB – B36

**Dystir í 3. deild sunnudagin 29. august – 13. umfar**

Fram – Skála
ÍF – TB
SÍ - NSÍ
EB/Streymur - GÍ
B68 - HB

**Málskjúttar 1. deild**

| | |
|---|---|
| Súni Olsen, GÍ | 9 |
| Rógvi Jacobsen, HB | 9 |
| Heine Fernandez, HB | 8 |
| Jonhard Fredriksberg, Skála | 8 |
| Sonni L. Petersen, EB/Str. | 8 |
| Bogi Gregersen, Skála | 8 |
| John Petersen, B36 | 7 |
| Krzystof Popczynski, GÍ | 6 |
| Jacob Bymar, KÍ | 6 |
| Erling Fles, KÍ | 5 |
| Høgni Zachariassen, ÍF | 5 |
| Rúni Nolsøe, HB | 5 |

## VERT AT VITA

Nú er so aftur dystur í Fuglafirði, og hesaferð er tað VB, sum kemur norður at vitja. Fyrri dysturin millum feløgini bæði á Eiðinum í Vági endaði við einum 3-1 sigri til vágbingar. 3. deild spælir eisini ein sera týdningarmiklan dyst í vikuskiftinum móti TB. Næsti dystur okkara verður ikki fyrrenn 12. septembur, tá sundalagsmenn úr EB/streymi koma til Fuglafjarðar at vitja. Grundin til at so leingi er til næsta dyst, er at Føroyar skal spæla tveir landsdystir ímóti ávíkavist Sveis og Fraklandi.

# ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR

## ÍF-LIÐIÐ

1 Ken Bærentsen
2 Áki Petersen
3 Sverri Ellingsgaard
4 Viggo Johannesen
5 Teitur Joensen
6 Bartal Eliasen (liðsk.)
7 Tórstein Joensen
8 Fritleif í Lambanum
9 Høgni Madsen
10 Hanus Eliasen
11 Eyðolvur R. Petersen
12 Gunnar G. Nielsen
13 Høgni á Lakjuni
15 Eyðun Ryggshamar
16 Karstin Joensen
17 Høgni Zachariassen
18 Rúni Eltør
20 Sylla D. Amed
28 Magni á Lakjuni

**Venjari:**
Petur Mohr
**Hjálparvenjari:**
Tórstein Joensen
**Liðleiðarar:**
Símun Fornagarð
Eilif Eliasen
**Fysioterapeut:**
Álvur Hansen

## VB-LIÐIÐ

Bjarni Johansen
Mortan úr Hørg
Eyðun Jacobsen
Anders Sørensen
Jákup Olsen
Milan Kuljic
Palli Augustinussen
Símin Samuelsen
Poul N. Poulsen
Dan Djurhuus
Mindaugas
Kári í Lágabø
Jón Pauli Olsen
John Poulsen

Ongi ryggnummur eru tøk!

**Venjari**
Hans Nielsen
**Hjálparvenjari:**
Jón Joensen



**Eiler Rasmussen**
**Ólavur / Andreas**